SERSTØK BYGGISAMTYKT UNDIR GRÁASTEINI

SB_Tórshavn_undirGráasteini_2026_2026

Við heimild í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir frá 21. mai 1954, verða skipaðar hesar reglur fyri tað øki í Tórshavnar kommunu, ið nevnt er í 1. grein.

§1. ØKI SAMTYKTARINNAR

Stk. 1. Økið, ið serstaka byggisamtyktin er galdandi fyri, er avmarkað, sum sýnt er á viðfesta fylgiskjali 1, og fevnir um matr. nr. 1094c og 1094d, Tórshavn og allar jarðarlutir, sum eftir góðkenning av hesi byggisamtykt verða frábýttir ella samanlagdir nevndu ogn.

§2. ENDAMÁL OG HEIMILD

Stk. 1. Endamálið við hesi serstøku byggisamtyktini er at skipa íbúðarbygging í økinum.

Stk. 2. Økið liggur í umráðisparti A1, sum sambært almennu byggisamtyktini er ætlaður stakhúsabygging

Stk. 3. Sambært kap. II, § 5, stk. 10 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu er ásett, at í serstakari byggisamtykt fyri eitt nátúrliga avmarkað øki kann verða loyvt at byggja íbúðir.

Stk. 4. Fyri viðurskifti, sum ikki eru reguleraði í hesi serstøku byggisamtykt, eru ásetingarnar í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu galdandi.

§3 NÝTSLA ØKISINS

Stk. 1. Økið skal nýtast til íbúðarbygging í upp til 3 hæddir, umframt fríøki og felags hentleikar til íbúgvar, sí fylgiskjal 2.

§4. BYGGING OG STØDD HÚSANNA

Stk. 1. Íbúðarbygging má einans byggjast innanfyri byggifelt smb. fylgiskjali 2. Hjallar, skúrar og líknandi smáir bygningar kunnu byggjast í byggifeltinum og/ella í fríøkinum smb. fylgiskjali 2.

Stk. 2. Hús skulu byggjast við mønu.

Stk. 3. Mest loyvdu hæddir á bygging eru sum víst á fylgiskjali 3.

Stk. 4. Framsíður skulu sniðgevast við forskotnum veggjum og innvikum. Forskjótingar ella innvik skulu gerast fyri minst hvørjar 10 m. Fórskjótingin ella innvikið skal vera í minsta lagi 0,5 m. Áhongdir bygningslutir eru ikki at meta sum forskjóting ella innvik.

Stk. 5. Uppihaldsrúm skal gerast til íbúgvar í økinum, og skal hetta vera minst 2 m^2 fyri hvørja íbúð.

§5. VEGIR OG PARKERING

Stk. 1. Vegir skulu gerast sambært ásetingum í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu og sambært fylgiskjali 2.

Stk. 2. Minst 1 parkeringspláss skal gerast fyri hvørja búeind, umframt parkeringspláss til fólk við rørslutarni.

§6. ÚTSJÓND

Stk. 1. Øll bygging í økinum, sum byggisamtyktin fevnir um, skal gerast í samráð við byggimyndugleikan.

Stk. 2. Kommunan skilar sær rætt til at seta krøv til útsjónd av bygningum í sambandi við út- og umbygging ella nýbygging.

§7. BYGGING IÐ ER

Stk. 1. Hendan byggisamtykt er ikki til hindurs fyri, at núverandi lóglig bygging verður varðveitt, ella at hildið verður fram við lógligari nýtslu av eini ogn.

§8. BYGGINGARMYNDULEIKI OG ÁTALURÆTTUR

Stk. 1. Byggimyndugleiki og átalurættur eru sambært hesi byggisamtykt hjá Tórshavnar býráð einsamøllum.

§9. UNDANTAKSLOYVI FRÁ BYGGISAMTYKTINI OG BROYTINGAR HENNI

Stk. 1. Smávegis frávik frá reglunum í hesi byggisamtykt kann býráðið geva loyvi til, um so er, at dámur á økinum, sum byggisamtyktin roynir at skapa ella varðveita, ikki verður broyttur av teirri orsøk.

Stk. 2. Broytingar í byggisamtyktini kunnu verða gjørdar eftir samtykt býráðsins og góðkenning landsstýrisins eftir reglum um samtykt og góðkenning av nýggjum byggisamtyktum.

HEILSU- OG ORKUMÁLARÁÐIÐ	
Mál nr:	26/16354
Ætlanarskriv:	
Góðkent:	20/8-2026
Váttað:	



Tórshavnar Kommuna


Býarskipanardeildin

Heiti	Serstøk byggisamtykt undir Gráasteini, matr. nr. 1094c og 1094d				
Undirheiti	Fylgiskjal 1				
Mát	1:1000				
Dagur	09.01.2026	**Journal**	25/10305	**Teknað**	RVH



Tórshavnar Kommuna
Býarskipanardeildin

Heiti	Serstøk byggisamtykt undir Gráasteini, matr. nr. 1094c og 1094d				
Undirheiti	Fylgiskjal 2				
Mát	1:500				
Dagur	09.01.2026	**Journal**	25/10305	**Teknað**	RVH



Tórshavnar Kommuna
Býarskipanardeildin

Heiti	Serstøk byggisamtykt undir Gráasteini, matr. nr. 1094c og 1094d				
Undirheiti	Fylgiskjal 3				
Mát					
Dagur	27.01.2026	**Journal**	25/10305	**Teknað**	